# Fróðskaparsetur Føroya

## bjóðar í heyst skeið í føroyskum

Tú lærir at nýta málið sum amboð á ein góðan og fjøltáttaðan hátt í arbeiði og gerandislívi

Lærari: Lena Reinert

Tíðarskeið: 31. aug. - 18. nov. 2009
mánadag og mikudag, kl. 09.00 - 11.30
leygardagin 3. oktober kl. 09.00 - 14.30

Próvtøka: 23. og 25. november 2009

Fortreytir: Skeiðið er ætlað teimum, ið hava føroyskt á miðnámsskúlastigi ella samsvarandi

Tilmelding: Tilmeldingarskjal finnur tú á www.setur.fo

Tilmeldingarfreist: 17. august 2009

Skeiðsgjald: kr. 4.000,00

Næmingatalið er avmarkað. Gjaldast skal í seinasta lagi við skeiðsbyrjan

Skeiðs- og próvtøkugjald:
konto 9870 428.097.1
í Suðuroyar Sparikassa
viðm. navn og skeið

Skeiðsstaður: Fróðskaparsetur Føroya
Jónas Broncks gøtu 25, 4. hædd
100 Tórshavn

Tlf. 352500 ella setur@setur.fo
Upplýsing um skeiðið: Setursskrivstovan

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum



Mynd: sxc.hu/profile/chrissi & sxc.hu/profile/demordian

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo



SAMSKIP



# › Samskip søkir hálvtíðar skrivstovufólk til innflutningsdeildina

ENNEMM / SÍA / NM38335

**Starvslýsing:**
Sum skrivstovufólk á innflutningsdeildini hevur tú regluligt samskifti við viðskiftafólk í Føroyum og uttanlands.
Tú tekur tær av øllum vanligum skrivstovuarbeiði, sum í høvuðsheitum fevnir um fakturering, tollavgreiðslu, innan- og uttanhýsis sølu, eftirlitsuppgávur og arkivering.

**Førleikakrøv:**
Fyrimunur er, um tú hevur viðkomandi útbúgving og arbeiðsroyndir.
Vit leggja dent á ágrýtni, dugnaskap, nærlagni, miðvísi og tænastusinni, og at starvsfólk okkara ikki lata seg taka av fótum, um stundum trýst er á.
Vit vænta, at tú dugir væl at samskifta á føroyskum og enskum.

**Vit bjóða:**
- Eitt áhugavert, spennandi og fjølbroytt starv í heimligum og altjóða umhvørvi.
- Góðar møguleikar fyri persónligari menning.

**Setanartreytir:**
Starvið er hálvtíðarstarv og verður lønt sambært avtalu, sum er treytað av útbúgving og royndum.
Viðkomandi kemur at starvast á skrivstovu okkara í Tórshavn.

**Umsókn:**
Send umsókn við CV og øðrum viðkomandi skjølum til:

Samskip P/F
Yviri við Strond 23
Postsmoga 3255
110 Tórshavn

Merkt: "Umsókn"

Umsóknarfreistin er 17. august 2009 kl. 12.00.

**Starvið**
verður sett 1. september 2009.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Joel undir Leitinum, stjóra, á telefon 23 88 11

## › Fyrirtøkan

Samskip er ein altjóða flutningsfyritøka. Fyritøkan er ein tann størsta bingjuflutningsfyritøkan í Europa og bjóðar millum annað flutning av vøru til og úr Føroyum. Í Samskip samtakinum arbeiða uml. 1.400 fólk í fleiri enn 20 londum. Samskip byrjaði í Føroyum í 2004 og er í dag ein av leiðandi feløgunum innan flutning til og úr Føroyum. Virksemið hjá Samskip verður samskipað í Kollafirði og Tórshavn. Frystigoymslan hjá Samskip í Kollafirði rúmar 7.000 tonsum. Skipini Helgafell og Arnarfell eru skrásett í FAS skipanini.. Tvey skip, á 900 TEUs hvørt, og eitt skip, 1.100 TEUs eru í fastari linjusigling til og úr Føroyum.



Endurlýsing

# Stjóri søkist

## Starvið sum kommunustjóri er leyst at søkja.

Umsóknir skulu vera kommununi í hendi
í seinasta lagi 24. august 2009 kl. 12.

Les meira á www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

SENDISTOVAN